# Tíðindaskriv

Betri Banki kunnger í dag roknskapin fyri 2024. Árið var sum heild merkt av góðum úrslitum á virkisøkjunum hjá bankanum og avlopið gjørdis 290 mió. kr.

Útlánini vuksu í 2024 við 5,5%, og merkti hetta øktar rentuinntøkur. Harnæst fekk bankin eitt gott avkast av sínum íløgum í 2024. Og samstundis sum inntøkurnar eru vaksnar, eru útreiðslurnar ikki vaksnar við somu ferð sum inntøkurnar.

*"Vit eru væl nøgd við úrslitið fyri 2024"*, sigur Jean Djurhuus, forstjóri í Betri Banka. "*Vit hava seinastu árini arbeitt miðvíst við at betra um gjaldførið og kapitalgrundarlagi hjá bankanum, og hetta er eydnast. Vit hava megna at økt okkara útlán við oman fyri 2 mia. krónum seinastu 4 árini. Hetta er gjørligt, tí at bankin hevur trúgvar innlánarar, eina stóra eginogn, gott gjaldføri og eitt gott lønsemi.*

Betri Banki væntar, at 2025 verður lakari enn 2024. Høvuðsorsøkin til hetta er, at renturnar eru lækkaðar í 2024 og 2025.

**Árið í stuttum:**

- Ársúrslitið: 290 mió. krónur
- Úrslitið áðrenn skatt: 351 mió. krónur
- Fíggjarstøðan javnvigar við 12.260 mió. krónur
- Útlán: 8.579 mió. krónur
- Innlán: 9.469 mió. krónur
- Eginpeningur: 2.554 mió. krónur
- Kjarnukapitalprosent við árslok er 36,6%